## Vandin vi › at brúka fartelefonir er sera lítil

**Landsst‡ri› hevur ikki ítøkiligar ætlanir um at uppl‡sa um spurningar, i› ver›a settir um møguligar vandar vi › n‡tslu av fartelefon, men fylgir landsst‡ri › vi› gongdini á økinum, sigur Bjarni Djurholm í svari**

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
*Ólavur í Beiti*

Jákup Sverri F. Kass spurdi um naka› hámark er í Føroyum í dag fyri, hvussu nógv SAR (Specific Absorption Rate) ella fartelefongeislavirkni, hvør einstøk fartelefon skal hava, og svarar Bjarni Djurholm, at ásetingarnar, i› óbeinlei›is ver›a fylgdir í Føroyum, eru ásetingar, sum settar eru av ETSI (European Telecommunications Standard Institute) og av WHO (World Health Organisation) um útgeislingarhámark fyri fartelefonir. WHO ásetir eitt evsta mark fyri útgeisling frá fartelefonum til 0,4w/kg fyri ein heilan mannakropp.

– Geislingin frá CE-merktum fartelefonum, sum í me›al er 0,25w - 1,5w, skal javnast út á ein heilan mannakropp, so ta› skilst, at geislingin er sera lítil, sigur Bjarni Djurholm.

**Langtí›arárin**

Og hann vísur eisini til eitt svar hjá ES-Kommissiónini, at tær umfatandi kanningarnar, sum eru gjørdar í Evropa seinastu tíggju árini, ikki hava s‡nt naka› sannroyniligt árin á heilsuna, tá ræ›ur um radiofrekvensgeisling, i› er vanlig fyri fartelefonir og basisstø›ir. Um ta› eru nøkur óheppin heilsulig hjáárin, kann ta› einans ver›a talan um eitt langtí›arárin, sum í løtuni ikki er kent.

Ein rá›stevna hevur júst veri› hildin í fjareystri vi› evninum »Elektromagnetisk felt og heilsuvandar«, grei›ur Bjarni Djurholm vi›ari frá í vi›merkingunum, har ni›urstø›an er, at »vandin vi› at brúka fartelefonir er sera, sera lítil, tí útgeislingin er bert nøkur fá prosent av tí, sum er ásett sum kanska verandi heilsuska›iligt«.

Vi›víkjandi spurninginum, um landst‡ri› arbei›ir vi› eini ætlan at uppl‡sa almenningin um tey ska›iligu árin, sum fartelefonin hevur á heilsuna hjá hvørjum einstøkum brúkara, svarar landsst‡risma›urin, at landsst‡ri› hevur ikki ítøkiligar ætlanir um at uppl‡sa um spurningar, i› ver›a settir um møguligar vandar vi› n‡tslu av fartelefon, men fylgir landsst‡ri› vi› gongdini á økinum.

# Lívfiskastø›in for›ar alivinnuni í Sandoynni

**Ávís fyritøka í Sandoynni hevur søkt landsst‡ri› um aliloyvi á Sands vág, men hevur landsst‡ri› óbeinlei›is givi› noktandi svar, sigur Ey›un Viderø**

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
*Ólavur í Beiti*

Er møguleiki fyri, at landsst‡risma›urin gongur umsóknini um aliloyvi á Sands vág á møti? Um so er, nær ver›ur loyvi› givi›? Um ikki, kann Løgtingi› so fáa nágreiniligar grundgevingar fyri stø›utakanini? Hetta vil Ey›un Viderø hava at vita frá Bjarna Djurholm.

Í vi›merkingunum, vísur Ey›un Viderø á, at ávís fyritøka í Sandoynni hevur søkt landsst‡ri› um aliloyvi á Sands vág, men hevur landsst‡ri› óbeinlei›is givi› noktandi svar. Í nevnda svari ver›ur víst á, at Vinnumálast‡ri› saman vi› Landsverkfrø›inginum arbei›ir vi› at tekna upp verandi aliøki av n‡ggjum, at Heilsufrø›iliga Starvsstovan vi› stø›i í hesum uppmátingum skal gera kemiskar og biologiskar kanningar, og í hesum sambandi fáa til vega bur›ardygdina á økjunum.

– Vístver›ur á, at Vinnumálast‡ri›, grunda› á møguligan umhvørvisvanda, er sinna› at halda aftur í vøkstrinum av framlei›sluni av alifiski í Føroyum. Somulei›is ver›ur vístá Lívfiskastø›ina í Skopun, at umhugsa› hevur veri› ikki at loyva a›rari aling í Sandoynni, sigur Ey›un Viderø.

Og ví›ari sigur Sandoyartingma›urin, at høvu›svinnuliga innatøkan í Sandoynni kemur frá fiskivinnuni, og tí er hetta mál sera vi›komandi. Í løtuni eru tvey flakavirki virkin í samarbei›i um ráfiskin, i› kemur til Sandoynna, og samstudis er n‡tt virki sett í gongd vi› høvu›smáli at fáa meiri gó›ska› vir›i burtur úr rávøruni.

### Dálking

– Tá vístver›ur til dálkingarvandan í samabandi vi› Lívfiskastø›ina, so er kunnugt, at stø›in hevur beinlei›is samband vi› aliringar hjá sama í Hesti, eins og aliringar eru í havnini vi› Gomlurætt. Millum Skopun og hesi stø› er regluligt fer›asamband, so ta› er ilt at skilja, at stø›in ver›ur útsett fyri serligum smittuvanda av aliringum á Sands vág.

– Ta› er stórt spell, at stóru møguleikarnir innan alivinnunan skulu ver›a for›a›ir í Sandoynni, tí ein lívfiskastø› er lødd í oynni. Skal talan harafturímóti ver›a um, at Sandoyggin skal gerast mi›depil fyri lívfisk, so eiga nógv meiri ví›fevnandi útbyggingar at ver›a gjørdar, og harvi› hev›i oyggin so fingi› sín part av inntøkuni av alivinnuni.

Løgtingsmenninir fyri Sandoynna hava bæ›i saman og hvør sær fleriri fer›ir havt samband vi› skiftandi landsst‡rismenn vi› fyrispurningi um hetta loyvi›, men hvørja fer› er svara›, at endaligar kanningar og tilmæli ikki eru grei› enn fyri at kunna geva endaligt svar, sigur Ey›un Viderø m.a. í vi›merkingunum.

# Framhaldandi skynsaman fíggjar- og búskaparpolitikk

**Spja›ing av virkseminum út um landi›, lækking av rentustu›linum og avtøka av meirvir›isgjaldsfrítøkuni av lønum til bygging og umvæling av egnum bústa›i, metir Karsten Hansen ver›a málrætta›i tiltøk móti hækkandi sethúsaprísum**

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
*Ólavur í Beiti*

Jákup Sverri Kass spurdi fíggjarmálará›harran, um ney›ugt er at seta tiltøk í verk til tess at taka hæddina av prísinum á sethúsum o.ø. møguligum árinum, sum koma í sambandi vi› eina komandi oljuvinnu í Føroyum?

Í svarinum sigur Karsten Hansen, fíggjarmálará›harri, m.a. at vi›víkjandi bygging av n‡ggjum sethúsum er yvireftirspurningurin eftir handverkarum ein stórur trupulleiki, sum kann gerast rættiliga álvarsligur, um ta› ikki ver›ur rikin ein varligur og skynsamur fíggjarpolitikkur.

Og ví›ari sigur Karsten Hansen seg hava lagt upp til ein fíggjarpolitikk, sum stimbrar virksemi í landinum minst møguligt, serstakliga í mi›sta›arøkinum. Hetta er m.a. fyri at sleppa undan, at lønartr‡sti› innan byggivinnuna gerst enn hægri og sostatt eisini sethúsaprísirnir.

– Eg ætli mær framvegis at leggja upp til ein fíggjarpolitikk, har ta› frá almennari sí›u ver›ur ra›fest solei›is, at byggivinnan ikki gerst ovurupphita› vi› tí úrsliti, at húsaprísirnir gerast enn hægri.

### Skjúldur húsamarkna›ur

Og vi›víkjandi sjálvum spurninginum, sigur fíggjarmálará›harrin, at hvussu oljuvinnan kemur at ávirka prísin á sethúsum er ilt at siga naka› um enn, men landsst‡ri› hevur avgjørt at seta ein arbei›sbólk, sum skal kanna, hvørji árin ein komandi oljuvinna kemur at hava á samfelagi› í heila tiki›. Landsst‡ri› fer eisini at gera sítt til, at oljuvirksemi, so vítt ta› er gjørligt, ver›ur spjatt kring landi›.

– Samanumtiki› kann sigast, at ta›, sum kann gerast fyri at for›a sethúsaprísunum at hækka ov nógv, er framhaldandi at føra ein skynsaman fíggjar- og búskaparpolitikk, sum virkar avmarkandi móti innlendska eftirspurninginum. Meira málrætta›i tiltøk móti hækkandi sethúsaprísum kunnu ver›a: Spja›ing av virkseminum út um landi›, lækking av rentustu›linum og avtøka av meirvir›isgjaldsfrítøkuni av lønum til bygging og umvæling av egnum bústa›i.

– Tiltøk, sum t.d hámarksprísir fyri sølu ella vinningi í sambandi vi› sølu av sethúsum, koma at virka búskaparliga avlagandi, og eggja til ein skjúldan húsamarkna›, sigur Karsten Hansen m.a. í svarinum.

# N‡ggjar kanningar í Skálavík

**Skal peningur fáast til vega til kanning og umvælan av grótkastinum í Skálavík, er ney›ugt, at Løgtingi› játtar pening til endamáli›, sigur Bjarni Djurholm**

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
*Ólavur í Beiti*

Er landsst‡risma›urin sinna›ur at fáa til vega pening til kanning og umvælan av grótkastinum vi› bátahylin í Skálavík? Um so er, nær kann roknast v›, at ney›ugu kanningarnar ver›a settar í verk? spurdi Ey›un Viderø í fyrispurningi, og í stutta svarinum, sigur Bjarni Djurholm, at yvirhøvur er ta› solei›is, at kommunurnar eiga og reka havnir og lendingar í Føroyum og skulu tessvegna rinda fyri bæ›i íløgur og rakstur av havnunum.

– Landi› kennir ta› fyrst og fremst sum sína skyldu at tryggja samfer›sluna millum oyggjarnar. Meginparturin av peninginum, sum ver›ur játta›ur til havnaendamál, fer tí til samfer›sluhavnir og samfer›sluendamál annars.

### Løgtingi ›

Landsverkfrø›ingsstovnurin kennir vi›urskiftini í bátahylinum í Skálavík rímiliga væl, men ney›ugt er at gera n‡ggjar kanningar, um so er, at bátahylurin skal umvælast.

– Um landsst‡risma›urin skal fáa pening til vega til kanning og umvælan av grótkastinum í Skálavík, er ney›ugt, at Løgtingi› játtar pening til endamáli›, sigur Bjarni Djurholm í svarinum.



# Løgreglan kannar eldsbruna

**Klokkan 03:29 mikumorgunin fekk Brandstø›in í Havn bo› um, at eldur var í einum sethúsum á Ternuryggi. Politi›in veit enn ikki, hvør orsøkin var til eldin**

ELDUR
*Dagfinn Olsen*

Eldur kom í eini sethús Vi › Sundsvegin á Ternuryggi mikumorgunin. Sløkkili›i› í Havn fekk bo› um eldin klokkan 03:29 og longu klokkan 03:34 var li›i› á sta›num.

Alt er brunni› innan úr húsunum.

Av Brandstø›ini ver›ur sagt, at einki var at gera, tí húsini stó›u í ljósum loga, tá sløkkili›i› kom á sta›i›. Tilfari› inni í húsunum var fyri stóran part tær millum sløkkili›sfólk so kendu bleytu pláturnar, i› geva nógv gass og sum brenna skjótt. Sløkkili›i› slapp ikki innar í húsini, men máti bert royna at dempa eldin og sløkkja uttanífrá.

Sløkkili›i› helt fram vi› arbei›inum, til umlei› klokkan 8 á morgni. Seinni vóru sløkkili›sfólk aftur ein túr á sta›num fyri at tryggja, at stø›an var, sum hon skuldi.

### Politii› kannar máli›

Løgreglan veit ikki enn, hvør orsøkin var til eldsbrunan á Ternuryggi, frættist av Politistø›ini í Havn.

Løgreglan er farin undir avhoyringar og kanningar.

Eingin bú›i í húsunum, nú tey at kalla brunnu í grund, men arbeitt var› vi› at seta tey í stand, eftir at n‡ggir eigarar hava yvirtiki› húsini fyri stuttum.

*Eldur kom í eini hús í Havn mikumorgunin. Alt er brunni› inan úr húsunum Mynd: Álvur Haraldsen*

# Heidi aftur silvur

**Heidi Andreassen framdi enn eitt bragd, tá hon svam undir gamla heimsmeti› á 100 m frísvimjing í Sidney**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Føroyar fingu enn eitt hei›ursmerki, tá føroysku svimjararnir vóru í hylinum í nátt.

Talan var um 100 metra frísvimjing, og Heidi Andreassen gjørdi ikki mætari enn at sláa heimsmeti›, sum australska Priya Cooper átti. Hetta rakk tó ikki til gullmerki›, tí ein ísraelsk svmjienta var enn skjótari, og kom á mál 0,87 sekund á›renn Heidi.

### Nøgd og tó

Um middagsleiti› fingu vit or›i› á Katrin Johansen, sum er venjari hjá føroysku gentunum, og sjálvandi var hon ovurfegin um úrsliti›.

– Hetta var bara heilt fantastiskt, men sjálvt um Heidi er nøgd, so i›rar hon seg um, at hon ikki svam enn skjótari, sigur Katrin Johansen.

Annars grei›ir hon frá, at áhugin fyri finaluni var alstórur.

– Áhugin hevur alla tí›ina veri› ovurstórur, men serliga tá talan er um lokalar favorittar. Hesu fer› var ta› ein australsk genta, sum hev›i heimsmeti›, og teir 13.000 ásko›ararnir royndu sjálvsagt at gera sítt til at eggja henni.

Ví›ari sigur Katrin, at í hálvfinaluni svam Heidi heldur róliga, og at hon tí byrja›i á geil 3, og ikki í mi›juni.

– Tr‡sti› av at svimja í mi›juni er sera stórt, og tí vóru vit samdar um, at hon skuldi taka ta› róligt í morgun. Hetta eydna›ist eisini, og hon sá út til at trívast fínt á tri›fremstu geilini.

### Øll eru bilsin

At enda sigur Katrin, at føroysku genturnar hava vakt almiklan ans her ni›ri.

– Fólk eru ovfarin av, hvussu gó› úrslit tær hava fingi›, tí tær eru somiki› ungar, heldur Katrin.

Bæ›i Heidi og Esther hava tvær kappingar afturat, á›renn lei›in gongur heim til Føroya. Hósdagin skulu tær royna seg í 100 metra ryggsvimjing, og fríggjadagin ver›ur 50 metra frísvimjing á skránni.